

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 11 - 2011

# Chevron fingið boribann í Brasil

Myndugleikarnir í Brasil hava sett amerikanska oljufelagnum Chevron forboð fyri at bora eftir olju ella gassi á brasilskum øki. Orsøkin er, at nógv olja er runnin úr einum brunni hjá Chevron úti fyri strondini við Rio de Janeiro, og fyrr enn felagið hevur staðfest orsøkina og kunna myndugleikarnar um hana, sleppur felagið ikki at bora meiri. Chevron hevur sagt seg harmast lekan, og felagið heldur seg eisini hava víst ábyrgd við at royna at steðga honum. Men teir brasilsku myndugleikarnir eru ikki nøgdir, og fyrr í vikuni fekk Chevron 28 milliónir dollarar í bót í sambandi við lekan. Samstundis hevur umhvørvismálaráðharrin, Izabella Teixera, sagt, at felagið fær størri bót, um kanningar skuldu víst, at lekin er komin av, at felagið hevur brotið galdandi reglur. Lekin úti fyri Rio de Janeiro-strondini varð staðfestur í síðstu viku. Sambært tíðindastovunum runnu millum 200 og 330 tunnur út í havið, tá lekin var upp á tað ringasta. Fleiri skip hava tikið olju upp av sjónum, og tey seinastu tíðindini siga, at nú er oljubletturin ikki størri enn einar tveir ferkilometrar.